100 stovnspláss afturat í summar

Seint í summar fáa gott og væl 100 børn pláss í barnagarði í Havn. Tá letur nýggi barngarðurin í Vesturbýnum upp, og nakað um sama mundið letur barnagarðurin hjá Føroya Tele upp

DAGSTOVNAR

Turið Kjølbro

Nýggi dagstovnurin í Øksnagerði, ið er mettur at kosta 8 mió. krónur, fer at taka 70 børn.

Mynd: Jens Kristian Vang

Nýggi dagstovnurin í Vesturbýnum í Havn er reistur og partvís innilokaður. Stovnurin, sum liggur í Øksnagerði, er bygdur við eini kjarnu, har fýra lonir ganga út frá. Upprunaliga skuldi stovnurin hava tríggjar stovur til 20 børn hvør, men síðani hevur Tórshavnar býráð samtykt at gera eina stovu afturat til børn við serligum tørvi. Stovnurin, ið er mettur at kosta 8 mió. krónur, fer tískil at taka 70 børn. Ætlanin var, at stovnurin skuldi standa klárur at taka fyrstu børnini inn í august. Men orsakað av eitt nú keðiligum veðri, er byggingin seinkað nakað.

– Vit rokna við, at táið næsta skúlaár byrjar, verður í øllum førum ein stova liðug. So skuldi stovnurin annars staðið liðugur eina ferð í september, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður.

Stovan, sum er komin afturat, verður til tíggju børn í fyrstu syftu. Børn, sum hava serligan tørv.

– Serligi tørvurin hjá børnunum kann vera ymiskur. Til dømis klára summi børn ikki at vera á stovum, har ov nógv børn eru orsakað av larmi og slíkum. Hesi børnini koma av stovnum úr býnum, sigur Jan Christiansen.

Ein stova er sett av til vøggustovubørn, tó ikki yngri enn tvey ár.

– Politikkurin hjá okkum er, at vit royna at nøkta tørvin á stovnsplássum úr erva av, tað vil siga fáa teim elstu børnunum pláss í barnagarði fyrst. Tí fara tey smæstu í dagrøkt. Tað vísir seg nærum í øllum førum, at børn í barnagarðsaldri, sum eru í dagrøkt, ynskja eitt barnagarðspláss.

Aðrar loysnir

Keypið hjá Føroya Tele av einum sethúsum við Sundsvegin er komið uppá pláss og har verður pláss fyri 32 børnum. Helmingurin av børnunum vera børn hjá starvsfólkum á stovninum, meðan hin helmingurin verður til børn av bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu.

Bíðilistin var 28. mars 402 børn. Roknað verður við, at táið stóra útskiftið er farið fram í august, er bíðilistin 200 børn. Tórshavnar býráð arbeiðir við øðrum loysnum, sum skulu minka um bíðilistan, men býráðsformaðurin vil ikki úttala seg nærri um, hvørjar tær eru. Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at í hesum fíggjarárinum eru ikki pengar settir av til fleiri íløgur í bygging.

– Henda samgongan hevur sett sær fyri at loysa tørvin á stovnsplássum, og vit eru so at siga komin undir land, tá ið tað snýr seg um stovnspláss til børn í barnagarðsaldri. Nú ræður um at fáa teim yngru børnunum pláss. Í dag eru flestu børnini umleið tvey ár áðrenn tey sleppa inn. Trupulleikin er, at vit fáa ikki loyvi til at gera íløgur fyri meiri enn eitt vist. Tí er trupult at gera vanligar tradisjónellar barnagarðar. Tó rokna vit við at fáa gongd á fyrireikingarnar til ein ella tveir stovnar til 60 børn hvør afturat í hesum árinum. Um árskiftið skuldi í øllum førum verið greitt, hvussu vit útvega pláss til eini 100 børn, sigur Jan Christiansen.

Yvirlýsing frá aðalfundinum hjá Javna

Sagt verður við hesum frá, at á aðalfundinum hjá Javna tann 31. mars, varð fylgjandi yvirlýsing samtykt:

Ásannandi stóru bústaðarneyðina hjá menningartarnaðum í Føroyum í dag, átalar aðalfundurin hjá Javna harðliga hesi og heitir á avvarðandi myndugleikar landsins um, alt fyri eitt at taka henda trupulleika upp til viðgerðar og miðvíst at arbeiða fram ímóti, at menningartarnað fáa mannsømulig íbúðarkor at liva undir.

Í áliti frá Javna um bústaðarviðurskifti hjá brekaðum í Føroyum ár 2000 verður staðfest, at samlaði tørvurin á búplássum til brekað runt landið tey komandi 10 árini eru 81 búpláss. Afturat hesum eru heili 87 búpláss, sum óvissa er um, og 25 har endaliga ikki er mett um tørvin. Nýggjastu tølini um bráfeingis tørv á búplássum er í dag 30.

Tað ið útint er á økinum tey seinastu 20 árini er, at tey flestu menningartarnaðu eru flutt av Eirargarði 14-16 í smærri stovnar og sambýlir. Afturat hesum er 1 sambýli komið í Vági og 1 í Runavík. Alt ov lítið er gjørt fyri at útvega menningartarnaðum bústað uttan fyri foreldraheimið.

Framdu tiltøkini nøkta tí á ongan hátt tørvin og eigur at verið farið til verka beinanvegin, tá verandi støða er ótolandi fyri tey menningartarnaðu og avvarðandi teirra.

Lindin biður um størri styrki

Kristiliga útvarpsrásin hevur søkt um loyvi at senda við 1000 watt av Brúnaskarði. Fær rásin loyvið, fer hon at hoyrast munandi betur í Norðoyggjum og Eysturoy

ÚTVARP

Eyðun Klakstein

– Vit hava søkt um loyvi at senda við 1000 watt á Brúnaskarði, og fáa vit loyvi til tað, fara vit at hoyrast nógv betur í Norðoyggjum og í Eysturoynni, sigur Preben Hansen, sum er nevndarformaður í Lindini

Klaksvík: Mikudagin á middegi skifti útvarpsrásin, Lindin, frekvens á Brúnaskarði, og um stutta tíð vónar rásin, at hon kann senda við 16 ferðir so stórari styrki, sum sent verður við í løtuni.

– Vit hava søkt um loyvi at senda við 1000 watt á Brúnaskarði, og fáa vit loyvi til tað, fara vit at hoyrast nógv betur í Norðoyggjum og í Eysturoynni, sigur Preben Hansen, sum er nevndarformaður í Lindini.

Í løtuni sendur Lindin við 60 watt á Brúnaskarði, meðan Útvarpið og Rás 2 senda við nøkrum 100 watt.

Senda meiri úr Klaksvík

Lindin fór fyrr í ár undir at senda sítt kristiliga tilfar til norðoyingar, men fyrsta tíðin hevur verið merkt av trupulleikum, tí frekvensurin, sum rásin fekk tillutað, hevur óróg va sendiviðurskiftini í Klaksvík.

Mikudagin flutti Lindin av 105 MHz til 103 MHz, og tað skuldi bast teimum trupulleikum, sum hava verið í Klaksvík.

Umframt at senda til Klaksvíkar, ætlar Lindin eisini at senda úr Klaksvík.

– Vit mangla útgerð til at kunna senda úr Klaksvík, men ætlanin er at gera neyðugu íløguna, sum kostar eini 60.000 krónur, sigur Preben Hansen.

Lindin ætlar at brúka Studio Pegasus til sínar sendingar, men fyri at fáa góða góðsku á sendingarnar úr Klaksvík, má serlig útgerð keypast støðina í Havn, so rásin kann taka ímóti tilfarinum og senda tað út í luftina við góðari góðsku.

Eisini til Suðuroyar

Lindin fer í næstum at senda í Suðuroy eisini. Rásin hevur fingið stórfingna gávu til at keypa sendara til Suðuroynna, og Preben Hansen roknar við, at Lindin kann fara undir at senda til Suðuroynna fyrst í juli mánaði.

Lindin skal hava útgerð úr útlandinum, og antennan, sum nú sendir á Brúnaskarði, skal flytast til Suðuroyar, og nýggj antenna setast upp í Klaksvík.

Hetta kemst av, at antennarnir eru lagaðar til ásvísan frekvens, og nú frekvensurin í Klaksvík verður broyttur, missir antennan styrki. Lindin skal senda við 105 MHz í Suðuroy, og tí kann antennan á Brúnaskarði brúkast til tað.

EITT AMBOÐ Í OKKARA TÍÐ

Teresia var ein av hundrað túsund, sum fyri trettan árum síðani vórðu drigin til Uhuru lundina í Nairobi fyri at hoyra Guds góðu tíðindi og síggja hvat tey førdu við sær.

Guds kraft varð staðfest við at syndarar, sjúk og bundin vórðu sett í frælsi. Teresia Wairimu hevði ikki droymt um, at slíkt kundi henda, men har hon sá hetta við sínum egnu eygum, bað hon eina einfalda bøn. Gud hoyrdi hana, men svaraði bønini langt út um tað hon, ella nakar annar hevði droymt um.

Í dag samlar Teresia Wairimu 250.000 til 300.000 menniskju í Uhuru lundini í Nairobi í Kenya. Hon er kend fyri sína sterku tænastu, har m.o. 1.000 menniskju eru grødd frá AIDS og fleiri eru vakt upp frá deyðum. Hon ferðast kring allan heimin, prædikar evangeliið, sum verður staðfest við undrum og teknum.

Evangelisk møti

í Høllini í Runavík

20., 21. og 22. apríl

Teresia Wairimu

Jens Garnfeldt **Bergur Skovgaard**

Fríggjakvøld **kl. 19.00** møti v/ Teresiu Wairimu

Leygarmorgun **kl. 10.00** seminar v/Jens Garnfeldt og Bergur Skovgaard

Leygarkvøld **kl. 19.00** møti v/Teresiu Wairimu

Sunnumorgun **kl. 11.00** morgunmøti v/Jens Garnfeldt

Sunnukvøld **kl. 18.00** møti v/Teresiu Wairimu

Lovsangskór úr Betania, Filadelfia, Evangeliihúsinum, Kelduni, Rhema og Lívsins Orð luttaka.

Í samband við kvøldmøtini verður skipað fyri koyring úr Havn og aftur til Havnar

EVANGELISKA SAMTAKIÐ

KARISMA